Útbjóðing

# Reingerð á Farstøðini

Við hesum verður reingerðin av Farstøðini hjá Strandfaraskipum Landsins, Eystara Bryggja, boðin út.

**Uppgávurnar fevna um**
Á Farstøðini er talan um 2 hæddir og hølir sum skrivstovur, toilettir, gangir, onnur smáhølir og trappuuppgongd.
Nærri avtala verður gjørd um uppgávur og treytir, herundir arbeiðstíðir.

**Førleikakrøv**
Vit vænta at umsøkjarar lúka fylgjandi høvuðskrøv:
• Hava viðkomandi royndir
• Eru álítandi

**Tilboð**
Tilboð, ið eru gjørd út frá avtalu um uppgávurnar, skulu stílast til:

**Strandfaraskip Landsins**
att. Starvsfólkadeildin
Boks 88
FO-110 Tórshavn

og skal vera fyritøkuni í hendi í seinasta lagi fríggjadagin 17. mai 2002

Áhugað verða vinarliga biðin um at seta seg í samband við Regin Vágadal, ferðslusamskipara, tlf. 34 30 00 ella e-post: rev@ssl.fo fyri at fáa nærri at vita um uppgávurnar.

Strandfaraskip Landsins er ein landsfyritøka undir Vinnumálastýrinum/ -Samskiftisdeildini.

Høvuðsuppgávan hjá fyritøkuni er at lúka landsins tørv á innanlanda fólka- og farmaflutningi, og skal fyritøkan í so stóran mun sum gjørligt rekast á handilsligum støði. Fólka- og farmaflutningurin setir stór krøv um eina góða kundatænastu, herundir trygd, reglusemi og skjótleika.

Árliga rakstrarætlanin hjá Strandfaraskipum Landsins javnvigar við yvir 150 mió. kr. Talið á starvsfólkum svarar til 180 fulltíðarstørv, herav umleið 155 operatørar. Talið á flutningsanleggum er 11 skip, 40 bussar og 15 lastbilar. Flutningsuppgávurnar fevna um alt landið.

STRANDFARASKIP LANDSINS

FØROYA LÆRARASKÚLI

# Størv á Føroya Læraraskúla

Hevur tú hug at royna teg í einum mennandi pedagogiskum starvi í støðugari broyting, hava vit eina spennandi avbjóðing til tín á Føroya Læraraskúla.

Føroya Læraraskúli hevur til uppgávu at útbúgva lærarar og pedagogar. Útbúgvingin er skipað við fastari tímatalvu, sum við jøvnum millumbilum verður niðurløgd til frama fyri evnisog verkætlanararbeiði.
Størvini, sum leys eru at søkja eru hesi:

**Støddfrøði:** Hetta er tímalærarastarv. Uppgávuøkið er grundlærugreinin støddfrøði í 1. flokki á læraraútbúgvingini.
Tímatalið er 7,5 um vikuna.

**Føroyskt:** Hetta er tímalærarastarv. Uppgávuøkið er grundlærugreinin føroyskt og linjugreinin føroyskt á læraraútbúgvingini, møguliga eisini á pedagogútbúgvingini. Endaliga ásetingin av undirvísingini verður ásett í samstarvi við læraran, sum er í føstum starvi í føroyskum.
Tímatalið er 7 tímar um vikuna.

**Týskt:** Hetta er tímalærarastarv. Uppgávuøkið er linjugreinin týskt á læraraútbúgvingini.
Tímatalið er 7,5 tímar um vikuna.

**Enskt:** Hetta er tímalærarastarv. Uppgávuøkið er linjugreinin enskt á læraraútbúgvingini.
Tímatalið er 7,5 tímar um vikuna.

**Drama:** Hetta er tímalærarastarv. Uppgávuøkið er drama á pedagogútbúgvingini og læraraútbúgvingini.
Tímatalið er 11 tímar um vikuna.

**Evning og handarbeiði:** Hetta er fast starv fulla tíð. Uppgávuøkið er evning og handarbeiði á grundlærugreinunum og linjugreinunum á læraraútbúgvingini, og í virknisgreinunum á pedagogútbúgvingini. Endaliga ásetingin av undirvísingini verður ásett í samstarvi við læraran, sum er í føstum starvi á økinum.

**Smíð:** Hetta er fast starv fulla tíð. Uppgávuøkið er grundútbúgvingin og linjugreinin á læraraútbúgvingini, og smíð í virknisgreinunum í pedagogútbúgvingini.

**Sálarfrøði og serlestur:** Hetta er fast starv fulla tíð. Uppgávuøkið er sálarfrøði og serlestur á læraraútbúgvingini og pedagogútbúgvingini.

Tey, ið sett verða í størvini, eiga sum høvuðsreglu at hava útbúgving samsvarandi cand.mag. ella cand.ped. frá hægri góðkendum lærustovni, ella aðra útbúgving, sum hóskar til uppgávurnar.

Viðkomandi skulu vera fús at samskipa útbúgvingarvirksemið í teirra lærugrein ella lærugreinum við aðrar lærugreinar, m.a. í sambandi við evnisarbeiði og verkevni, og hava skyldu at luttaka í arbeiðsbólkum, útbúgvingunum at frama, og sum heild í øllum tiltøkum, sum sett verða í verk at menna útbúgvingarnar.
Eisini fáa tey, ið sett verða, møguleika at undirvísa á teimum eftirútbúgvingunum, sum Læraraskúlin setur í verk.

Størvini verða sett sambært sáttmála millum Mentamálastýrið og Magistarafelag Føroya.

Umsóknirnar skulu vera Føroya Læraraskúla í hendi innan 31. mai 2002.
Setanin er galdandi frá 1. august 2002.

Tey, sum hava áhuga í hesum størvum, eru væl komin at seta seg í samband við Læraraskúlan, tlf. 313501 ella á telduposti til paulini@flsk.fo

**Rektarin**

**Eysturoyar Røktar- og Ellisheim**
620 Runavík

# Sjúkrahjálpara / heilsuassistent

0,7 tíð, at byrja **1. juli 2002**.

Umsóknarfreist: 14. mai 2002.

Løn og setanartreytir í sambært við galdandi sáttmála.

Nærri størvinum viðvíkjandi fæst at vita frá fyristøðumanninum á tlf. 448185 ella 448201.

**Eysturoyar Røktar- og Ellisheim**
620 Runavík

# Frítíðaravloysarar

fyri **sjúkrasystrar og sjúkrahjálparar/heilsuassistentar** í tíðarskeiðnum 3. juni – 31. august 2002.

Umsóknarfreist: 14. mai 2002.

Nærri størvinum viðvíkjandi fæst at vita frá fyristøðumanninum á tlf. 448185 ella 448201.


Sosialurin

Sethúsaklædningur



Plastik er á goymslu

Slitsterkur & viðlíkahaldsfríur

pf Klement Petersen

Høgabøl • 600 Saltangará • tel. 447560 • fax 448460

AUTO

-Dag & nátt-

-Alt døgnið-

Hýra bil - ring 311234

BENZIN DIESEL KIOSK



AUTO 311234








Ætlar tú at keypa

nýggjan bil

og




ongan brúktan




lata inn í býti? So ber til at gera

kvetti nú

Vit hava plásstrot vegna ov stórar goymslur av hesum modellum:



Mazda 626
Mazda Premacy
Mazda E2200 við trælast
Mazda E2200 innilokaður vørubilur
Mazda E2200 6 og 9 pers. Stationcar
Mazda B2500 RegCab, StrCab og DblCab, 4x2 og 4x4

Avsláttirnir eru frá

Kr. 20.000 og uppeftir

BERG MOTORS
Staravegur 1-3 • Tel. 31 35 35 • Fax 31 77 35
Klaksvík · Tel. 28 10 00

Gastrolux® originala -tann feittfría pannan



- Steiking heilt uttan feitt
- Slettir minst møguligt
- Løtt at reingera - sápa skal ntast
- Brennir aldrin matin
- Metaltól kunnu gjarna ntast
- Kløddd við nikkelfríum lagi
- Lívslangt garanti móti skeivleikum

Uppliva ta heilt serligu pannuna, ið gevur allar fyrimunir!

Um hetta hevur tín áhuga, ring til okkum og vit senda tær ein faldara

GASTROLUX FØROYAR
350 Vestmanna • Tel. 42 45 99 • Fartel. 21 55 99, 21 75 99

Plenuklipparar o.a. til urtagarðsrøkt



Opið er leygardagin frá kl. 9-14
Ger kvetti - Vit hava sera góð TILBOÐ

Pf. THOMAS DAM Á HÁLSI
Heykavegur 3 - Tlf. 311400

THOMAS DAM
Pf. THOMAS DAM
amboð & maskinur
Jónas Broncksgøta 25 • Tel. 31 04 44 • Fax 31 78 38

Internet
Sosialurin
www.sosialurin.fo


**Arbeiðseftirlitið**
*Occupational Safty and Health Administration*

**Vegna farloyvi er eitt sera áhugavert og spennandi starv sum**

# eftirlitsfólk

**innan arbeiðsumhvørvi** og alt, ið hartil hoyrir, leyst at søkja, til setan 1. juni, ella sum skjótast. Starvið er tíðaravmarkað til 15. januar 2003.

**Arbeiðsuppgávurnar** eru sera fjølbroyttar og kemur viðkomandi, umframt vanligt eftirlitsvirksemi, eisini at taka sær av evni og tilfari og øllum inniklima mátingum og sundurgreiningum av hesum.

**Rætti umsøkjarin** við tøkniligum førleika, royndum innan evnafrøðiligar mátingar, við góðum evnum at málbera seg skrivliga á føroyskum og við teldukunnleika hevur fyrimun.

**Setanartreytir.** Løn og setanartreytir sambært sáttmála millum landsstýrið og viðkomandi yrkisfelag.

**Upplýsing og umsókn.** Nærri upplýsingar fáast við at venda sær til Arbeiðseftirlitið, tlf. 317811 og tosa við Karl Joensen, stjóra. Skrivlig umsókn, við avriti av prógvi og møguligum ummælum skal, áðrenn 4. mai 2002, sendast til:

**Arbeiðseftirlitið**
Boks 1134
110 Tórshavn